# Kundu forðað vanlukku

Nógv bendir á, at vanlukkan við Air France-flogfarinum, sum datt niður í Atlantshavið tann 1. jun, var ongantíð hend, um flogskipararnir høvdu havt atgongd til eitt nýggjari veðurkort enn tað, sum teir høvdu. Tað er niðurstøðan í einari frágreiðing, sum felagið hjá flogskiparunum í Air France hava kunngjørt. Har stendur, at veðurkortini, sum flogskipararnir í flogfarinum høvdu lagt ferðina um Atlantshavið eftir, vóru eitt samdøgur gomul. Men teir kundu havt fingið nýggjari veðurkort, sum vístu, at illveður var á leiðini úr París til Brasil, skrivar flogskiparafelagið. Vanlukkan kostaði næstan 300 mannalív.



# Mótmæla hvalaveiði

Íslendska sendistovan í London fekk um vikuskiftið skriv úr 26 londum, sum mótmæla íslendsku stórhvalaveiðini og krevja, at íslendingar gevast at veiða stórhval. Tey 26 londini mótmæla hvassliga, at íslendskir hvalabátar hava veitt 204 stórhvalir í ár. Millum londini, sum hava skrivað undir mótmælið og kravið um veiðibann, eru USA, Bretland, Týskland, Frakland, Spania og Portugal. Sambært íslendskum fjølmiðlum er tað ikki av tilvild, at mótmælið kemur júst ní, tí tað verður tengt at íslendsku umsóknini um limaskap í ES, siga miðlarnir.

# Geva reiðarunum frið í eitt ár afturat



*Maskinmeistarar og navigatørar siga, at teir vísa samfelagsinni og fara tí ikki at krevja meiri í løn frá reiðarunum og sostatt hava teir ikki sagt sáttmálan upp*

**Hvørki Skipara- og Navigatørfelagið ella Maskinmeistarafelagið fara at siga sáttmálan við Reiðarafelagið upp hesuferð**

ARBEIÐSMARKNAÐUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Vit halda ikki, at hetta er rætta tíðin til at sera fiskiflotanum krøv um eykaútreiðslur.

Tað eru Páll Hansen og Eyðstein Djurhuus, samdir um.

Teir báðir eru formenn í ávikavist Maskinmeistarafelagnum og Skipara- og Navigatørfelag.

Allir sáttmálarnir ímillum Reiðarafeløgini og tey trý manningarfeløgini ganga út nú ímóti ársenda og sum vit fortaldu í Sosialinum herfyri, hevur Føroya Fiskimannafelag longu gjørt av at siga sín sáttmála upp við kravi um betri løn og meiri frítíð.

## Ikki rætta tíðin

Men Maskinmeistarafelagið og Skipara- og Navigatørfelagið ætla ikki at ganga í fótasporunum á Fiskimannafelagnum.

- Vit hava gjørt av, at vit fara ikki at siga sáttmálan upp, staðfesta formaðurin í Skipara- og Navigatørfelagnum og Maskinmeistarafelagnum fyri Sosialinum.

Bæði feløgini hava havt nevndarfund nú í vikuni og har var niðurstøðan, at hetta er ikki rætta løtan at siga sáttmálan upp.

Samstundis vátta teir báðir fakfelagsformenninir, at Reiðarafelagið hevur heldur ikki sagt sáttmálan upp.

Og tá ið hvørgin parturin sigur sáttmálan upp, verða teir automatiskt framlongdir í eitt ár afturat, fram til 31. desember 2010

## Ikki rætta løtan

- Vit halda ikki, at vit hava so mikið álvarsligar trupulleikar í sáttmálanum, at vit halda, at vit eiga at siga hann upp nú, sigur Páll Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum.

Kortini ivast hann ikki í, at reiðararnir verða til at tosa við, skuldu teir komu eftir, at onkrar smávegis dagføringar eru ynskiligar.

Hann er væl kunnugur við, at støðan hjá fiskiflotanum er vánalig og hann heldur ikki, at hetta er rætta stundin til at seta reiðarunum krøv um størri útreiðslur.

- Vit hava hugsað um støðuna í fiskivinnuni. Vit hava víst samfelagssinni og vit halda, at tað hevur sera stóran týdning, at tað er friður á økinum, leggur Páll Hansen afturat.

Eyðstein Djurhuus, formaður í Skipara- og Navigatørfelagnum, er samdur.

- Sum gongdin í vinnuni er í løtuni, vænta vit ikki at fáa so mikið av ábótum á sáttmálan, at tað er rætt at siga hann upp, leggur hann afturat.

Men hann skoytir kortini upp í, at hetta merkir ikki, at Skipararnir eru fullvæl nøgdir við sáttmálan, tí onkrar broytingar eru, sum vit vilja hava.

Men tað verður so at bíða til eina aðru ferð.

# Hvalbingar raktir av spariknívinum

**- Vit noyðist at traðka á bremurnar fyri at halda tørn, sigur Otto Vest, borgarstjóri í Hvalba**

SPARITILTØK
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



- Vit sleppa ikki undan at seta sparingar í verk fyri at avmarka hallið á fíggjarætlanini.

Tað staðfestir Otto West, borgarstjóri í Hvalba.

Seinastu tíðina hevur nógv verið at hoyra um kommunur, sum hava verið noyddar at seta sparitiltøk í verk fyri at fáa fíggjarætlarnirnar at halda, nú inntøkurnar eru farnar at svíkja.

Og nú er greitt, at heldur ikki Hvalbingar sleppa undan sparingum, hóast Hvalbiar Kommuna annars hevur borið orð fyri at vera væl fyri.

Otto West, borgarstjóri sigur, at tí hevur bygdaráðið gjørt av at siga fýra av arbeiðsmonnunum hjá kommununi upp og teir hava nú fingið ætlanarskriv um uppsøgnina.

Tilsamans eru níggju mans í arbeiði hjá kommununi, so talan er um næstan helvtina av fólkinum, sum nú skal sparast burtur.

Borgarstjórin sigur, at hetta verður gjørt fyri at avmarkað hallið á fíggjarlógini mest møguligt og fyri at tálma útreiðslunum næsta ár.

Umframt uppsagnirnar, kann tað koma upp á tal at útseta onkrar vegagerðir í kommununi, sum ætlanin annars var at fara undir.

Hetta kann tykjast eitt sindur øvugt, tí tá ið fyrra hálvár var farið aftur um bak, kundi bygdaráðið staðfesta, at inntøkurnar hjá kommununi av skatti vóru øktar góð 3%.

- Men síðani hevur tað gingið verri og í juli og august er skattainntøkan tilsamans eina hálva millión minni enn mett var, tó at inntøkan í september var tann sama sum í september í fjør.

Borgarstjórin sigur, at tí hevur bygdaráðið gjørt av at seta sparingar í verk nú, fyri at sleppa undan at seta enn ógvusligari tiltøk í verk seinni.

Samstundis er kommunan nú í holt við at leggja fíggjarlógina fyri næsta ár, men Otto Vest ger longu nú greitt, at tað er ikki væntandi, at nakað serligt av úbyggingum verða í 2010.

## Onki endurgjald

Tá ið fíggjarætlanin fyri í ár varð løgd, hevði kommunan væntað eitt endurgjald úr landskassanum upp á einar 4-5 milliónir fyri grótkastið í havnarlagnum, sum fór í knús í eini ódn kyndilsmessuódnini síðst í januar í 2008.

Hvalbingar hildu seg hava eina góða sak, tí Skálavíkar kommuna fekk endurgjald fyri skaðan, sum hendi har í somu ódnini.

Men endurgjaldið kom ongantíð og tí hevur fíggjarætlanin í ár frammanundan eitt hall upp á fýra milliónir.

Hetta førir so eisini við sær, at Hvalbiar Kommuna hevur eina rokning uppá 2,4 milliónir fyri havnarlagið liggjandi, sum skal betalast næsta ár

Tilsamans kostar tað góðar 11 milliónir at umvæla grótkastið eftir ódnina, so tað er skilligt, at tað kemur ógvuliga illa við, at landið ikki eisini vil lata kommuni endurgjald fyri skaðan, eins og Skálavík hevur fingið.

Otto Vest leggur tó dent á, at bygdaráðið hevur ikki slepst málinum, tí teir halda, at tað er órímiligt, at allar kommunur ikki fáa somu viðferð frá landinum.